## Gospelkórið hjá Lindu Andrews í Talent 2008 í kvøld

Linda Andrews stjórnar Gentofte Gospel, sum er við í Talent 2008 fríggjakvøldið 12/09-2008. Linda Andrews sum er aktuel vid fløguni „Revelation“, sum á fimtu viku liggur á ”15 teimum Bestu” í ÚF, og sum liggur nr. 1 á tónleikalistanum hjá Lindini. Linda er nú við í Talent showinum hjá DR. Linda Andrews stjórnar Gentofte Gospel, og kórið hevdur stillað upp í showinum, og skal dystast ímóti einum øðrum sera góðum gospelkórid, „Sound of Gospel“. Afturvið sær hevur Linda Andrews tveir hjálpar dirigentar, Claus Christensen og Nellie Ettison! Gentofte Gospel var á koncertferð vid Lindu Andrews í Føroyum í 2006 og kórið hevði konsert í Havn og í Klaksvík.

-do

## Barnadeyðin minkar ov lítið

Sambært kanningum er barnadeyðin minkaður við 28 prosentum seinastu síðani 1990, men UNICEF eru bangin fyri, at tað verður torført at liva upp til málið til 2012, um at barnadeyðin skal skerjast niður við t veimum triðingum. Serliga er trupulleikin stórur í afrikansku londunum sunnanfyri Sahara og í Asia. Ringast er støðan í Sierra Leone, har 262 av hvørjum 1000 børnum, ið verða fødd, doyggja áðrenn tey gerast fimm ára gomul. Størsta orsøkin til barnadeyðan í Heiminum eru at børnini ikki at nóg nógv og ikki nóg rætt.

# Nýggj kirkja byggjast á Argjum

**Tórshavnar Býráð hevur nú samtykt at lata kirkjuráðnum á Argjum eitt stykkið omanfyri Spinnaríið at byggja nýggja kirkju á**

KIRKJUBYGGING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Ætlanin er nú at byggja nýggja kirkju á Argjum.

Fyrsta stigið á leiðini varð tikið í gjárkvøldið, tá ið Tórshavnar Býráð samtykti at lata kirkjuráðið á Argjum fáa eitt grundstykki ímillum Støðlagøtu og Sandá, omanfyri Spinnaríið, at byggja nýggja kirkju á.

Tað er kirkjuráðið á Argjum, sum hevur vent sær til býráðið at spyrja seg fyri um møguleikarnar at byggja kirkjuna á Argjum út, ella at fáa grundstykki at byggja nýggja kirkju á og tað er so endað við, at býráðið samtykti at lata tey fáa eitt grundstykki upp á 4000 fermetrar til eina nýggja kirkju

Av tí at økið liggur oman ímóti Sandá, var neyðugt at søkja friðingarmyndugleikarnar um undantaksloyvi frá náttúruverndarlógini til at byggja kirkjuna.

Eftir at hava viðgjørt málið, góvu friðingarmyndugleikunum loyvi til at kirkjan kann byggjast á økinum.

Á býráðsfundinum í gjárkvøldið varð upplýst, at Hoyvíkar kirkja og Samkoman Lívdin keyptu síni grundstykki frá Tórshavnar kommunu fyri kr. 156 krónur fyri fermeturin og tí samtykti býráðið, at grundstykkið til nýggju kirkjuna á Argjum skal kosta tað sama.



*Kirkjuliðið á Argjum vil hava betri umstøður til sítt kirkjulív, men heldur enn at byggja upp í kirkjuna, er ætlanin at byggja nýggja kirkju*

# Nú er bíðitíðin hjá nólsoyingum av

**Tórshavnar býráð samtykti í gjárkvøldið at gera eina útstykking til sethús í Nólsoy og tey fyrstu 6-8 grundstykkini verða klár heilt skjótt**

ÚTSTYKKING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú verður farið undir at gera eina útstykking til sethús í Nólsoy.

Tað samtykti Tórshavnar Kommuna í gjárkvøldið.

Á býráðsfundinum varð upplýst, at tey fyrstu 6-8 grundstykkini kunnu verða klár at byggja á heilt skjótt.

Tað vóru nólsoyingar sjálvir sum hava fregnast eftir grundstykkjum í bygdini og tí hevur nólsoyarnevndin mælt til at gera eina útstykking á økinum omanfyri barnagarðin og tað er nú samtykt.

Men nólsoyarnevndin metti, at grundstykkini blivu ov dýr eftir tí, sum upprunaliga lá í kortunum og at ongin peningastovnur fer at fíggja bygging í Nólsoy, blivu grundstykkini ikki bíligari.

Sostatt hevur verið roynt at minka um kostnaðin við at taka gongubreytina burtur úr ætlanini og við at býta útreiðslurnar út á fleiri útstykkingar og á økið sum er lagt av til stovnar og svimjihøll. Samstundis skal íbindingin í vegin fíggjast av eini aðrari kontu.

Tá ið alt hetta er skarvað av, fara grundstykkini í Nólsoy at kosta einar 560 krónur fyri fermeturin.



*Í Nólsoy verða nú aftur grundstykki at fáa og tey fyrstu ferða klár at byggja á heilt skjótt*

### Avtalu um grót

Men skal útstykking gerast, krevst bæði grót og pláss at tyrva avgrevstur í og Tórshavnar Býráð samtykti tí eisini í gjárkvøldið, at royna at fáa avtalu við hagapartin Heimaru Helvt um at sleppa at halda fram í grótbrotinum í Nólsoy og at fáa meiri grót haðani.

Hagastýrið er sinnað at gera sáttmála, har Tórshavnar kommuna kann brúka grótbrotið til fráleggingartilfar av ymsum slagi fyri 4000 krónur um árið.

Hagastýrið er harumframt sinnað at selja Tórshavnar kommunu 4.500 fermetrar av leysum gróti, sum í dag liggur í grótbrotinum, fyri tríggjar krónur rúmmeturin.

# Fáa nu pengarnar aftur

**Tey, sum halda veg vera villeidd av Tórshavnar Býráði og tískil vilja sleppa at lata grundstykkini við Myllutjørn inn aftur, fáa nú pengnarnar aftur**

ÚTSTYKKING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nógv av teimum húskjunum, sum nakað síðani fingið grundstykki við Myllutjørn, hava følt seg villeidd av Tórshavnar Býráði, tí tey siga, at grundstykkini blivu væl dýrari enn kommunan hevði lovað teimum.

Men tað er nú greitt, at tey, sum vilja sleppa at lata grundstykkini inn aftur, fáa nú pengarnar aftur.

Á býráðsfundi í Havn í gjárkvøldið, varð samtykt at gera frávik frá reglunum.

Sostatt fáa tey, sum vilja sleppa av aftur við grundstykkið við Myllutjørn, pengarnar aftur samstundis sum tey koma aftur á bíðilistan á sama stað, har tey stóðu frammaundan.

Sum reglarnar eru nú, hevði hetta ikki borið til og tey høvdu heldur ikki fingið pengarnar fyri stykkið aftur, fyrrenn annar keypari er funnin.

Men nú fáa fáa tey bæði pengarnar aftur og koma aftur á bíðilista á sama stað sum tey stóðu á áðrenn.

Men hetta er so bara galdandi fyri tey sum longu hava keypt grundstykki.

Við Myllutjørn eru 63 grundstykki og tey flestu boðin út.

Higartil hevur býráðið fingið boð um, at eini 14-15 ætla at lata stykkini inn aftur, tí tey halda seg hava fingið skeiva kunning frá býráðnum.

Kortini vóru tað fleiri býráðslimir, sum ivaðust í hesum, tí tey væntaðu, at tá ið avtornar, fara tey allarflestu at lata stykkini innaftur.

Annars væntar býráðið ikki, at tað verður tórført at sleppa av aftur við stykkin, tí í løtuni standa 1787 umsøkjarar á bíðilista og við hesi útstykkingini er kommunan komin til nummar 135.